TING-HELLAN

# lkating!



um tað stendur á jøvnum millum flokkarnar í valdømunum í Danmark.

Tí er tað heldur ikki bara sum at siga tað, tá sagt verður at føroyskir fólkatingspolitikkarar bert skulu taka sær av føroyskum viðurskiftum. Nógvar av avgerðunum um donsk innlendisviðurskifti hava beinleiðis ella óbeinleiðis ávirkan á føroysk viðurskifti, tí avgerðirnar eisini tengja altjóða partin at sær.

Per Stig Møller kann við sínum treiskni tvíhalda um, at drotningin ikki kann býtast í trý, tí er Danmark ein eindarstatur. Hetta er ein hugsan, sum hvørki er í tráð við føroyska ella danska fólksliga veruleikan og fatanina av viðurskiftunum. Viðurkendi danski søgufrøðingurin Uffe Østergaard brikslar longu í 1996 donsku miðsavnandi løgligu statsfatanina, sum heldur fast um at Heimastýriskipanirnar eru eitt kuriosum, og tí ikki hava ávirkan á Danmark sum eindarstat.

Fyri Føroyingar snýr fólkatingsvalið seg um hvat gerast kann úteftir, og tað merkir ikki bert í mun til Danmark, men eisini longri. Tað nýggja er, at fullveldisvongurin fekk báðar sessirnar, um vit velja at tulka soleiðis. Velja vit hinvegin at siga, at tað var andstøðan og so álitisváttan til Annfinn, fyri mista løgmanssessin, men eisini sum samgonguumboð, so er ikki so nógv nýtt í tí kortini.

## Broytingar í Danmark

Valið í Danmark hevði tó broytingar við sær. Hvørki Cemtrumdemokratarnir ella Kristiligu Demokratarnir komu inn, og tá Radikale Venstre hevur sagt, at flokkurin ikki fer í stjórn við Venstre-Konservative, so er miðjan vekk. Báðir stuðulsflokkarnir Konservativu og Radikalu høvdu framgongd, sum vísur at veljarin ikki heilt er fallin fyri sonevnda forsetavalsfrymlinum.Harafturat varveitti Dansk Folkeparti ikki bara sína støðu, men styrkti hana.Hinir flokkarnir hava ikki tora at tikið fram trupul mál sum útlendingapolitik upp í tøkum tíma og tí hevur hesin, eftir mínum tykki ódámligi flokkur, fingið pláss og stuðul frá teimum, sum kenna seg ótryggan av broytingum. Sigast skal eisini, at flokkurin helst eisini fær nakað fyri at verða ímóti ES. Alt valstríðið var merkt av, at flokkarnir høvdu innanhýsis semjur um hvat valið ikki skuldi snúgva seg um. Valið kom fyri almenningin at verða ein dystur um at lova sum mest fyri at keypa veljaran, og fá eru tey sum trúgva at øll lyftini verða hildin. Men valið kostar eisini formonnum í tapandi flokkunum sessin og koppaði hetta valið nógvum formonnum, sum vóru noyddir at ásanna at valið var alt annað enn nøktandi.

## Kanningar

Fjølmiðlarnir valdu eisini at leggja sera stóra áherðslu á veljarakanningar og hvat veljarar hjá ymsu flokkunum ynsktu, heldur enn at royna at fáa eitt veruligt politiskt kjak. Kanska bleiv hetta so, tí flokkarnir vóru so fastlæstir. Men hesin háttur at viðgera politikk, er eftir míni sannføring farin út um alt mark. T.d. verður spurt um ymisk nágreinilig mál millum flokslimir, tinglimir, ráðharrar og floksveljarar. Haðani verður so niðurstøða gjørd. Hetta hevur fleiri trupulleikar við sær. T.d. eru hesar kanningar sera óálítandi og ofta er spurnararbeiði gjørt av lesandi, sum fáa pening fyri hvønn spurdan einstakling. Hetta ger tað freistandi at snýta fyri at fáa meira í løn. Tvs. at spurnarbløð verða avgreidd, uttan at tað veruliga verður tosað við nakran.

At slíkar kanningar og ávirkanin av teimum ikki verður meira kritiserað, er partvís tí hetta gevur nógv arbeiði til fólk við samfelagsvísindaligum útbúgvingum, og at hetta gevur fjølmiðlunum eitt kanningaramboð, og soleiðis enn meira arbeiði til tey, sum áttu at verið kritisk. Men hetta er heldur ikki bert galdandi fyri fjømiðlarnar, tí flokkarnir í Danmark, eins og í nógvum øðrum londum, gera somuleiðis slíkar kanningar, fyri at vita hvør boðskapurin selur, hvønn flokkurin skal ávirka og hvar, fyri at fáa fleiri atkvøður.

Eydnutíð hava vit ikki hendan trupulleikan í Føroyum. Landið er ov lítið til at tað ber til at hava stovnar, sum liva av slíkum kanningum. Sigast skal tó, at styrkin í sovorðnum kanningum er, at nærri samband kann fáast millum fólkslig ynskir og politikkaran. Kanningarnar hava tó ofta sett spurningarnar á ein hátt, sum kann verða misvísandi og tí ikki vísir veruligu fólksligu meiningina. Tí er tað eitt av stóru krøvunum til nýmótans politikkaran, at hann dugir at síggja hvat er í hesum kanningum, líkamikið um talan er um veljara- ella meiningakanningar. Annars enda vit við at fáa designproffessionellar politikarar uttan sál. Hetta kann gera at vit fáa miðalpolitikara sum er útbúgvingarliga betri fyri, enn teir eru í dag, og eisini er teknokratiskur. Vandin er at vit missa statsmennirnar, tí tað eru statsmennirnir sum lyfta eitt samfelag framum annað, og sum syrgja fyri nýbrotum, sum betra heimin. Tí er tað ein álvarsligur demokratiskur trupulleiki at brúka slíkar kanningar uttan fyrilit. Staðfestast má kortini at tær eru ein partur av nymótans politikki, og tí eru tað serliga flokkarnir og fjølmiðlarnir, sum skulu taka hesar við fyrivarni, og læra at brúka tær fyri at koma nærri fólkinum á ein skynsaman hátt.

Um mett verður eftir veljarakanningum, var hesa ferð ikki stórur áhugi fyri fólkatingsvalinum í Føroyum. Men hóast tað, so bleiv ov nógv lagt í hana Gallup Føroyar hevði gjørt fyri Útvarpið. Veljarakanningar eru ikki annað enn kanningar, og skulu heldur ikki verða meira. Tá talan er um slíkar kanningar, sum byggja á svar frá einum ávísum brotparti av fólkinum, er hetta altíð við fyrivarni. Her er nógv at taka hædd fyri; t.d. hvussu verða tey spurdu vald, hvussu verður spurt, hvat verður spurt um, hvussu nógv verða spurd, og eru tey landafrøðisliga umboðandi.

## Hvat lærdu vit?

Samanumtikið kunnu vit við at hyggja eftir fólkatingsvalinum í Føroyum og Danmark siga, at sæð uttanifrá sær tað ikki út sum sama val, ella eitt val til sama parlament, tí talan tykist um ymisk endamál og fatanir Valið hevur í Føroyum sett spurnartekin við, um hvat vit skulu brúka fólkatingsumboðanina til, og hvørjir persónar skulu stillast upp, men settu eisini avbjóðingarnar frá útheiminum á skránna Í Danmark hevur valið broytt politisku myndina munandi, tí miðjan at kalla er burtur og høgravendi óstortligi flokkurin Dansk Folkeparti staðfesti ikki bara sína støðu, men styrkti hana. Hetta er m.a. tí at hinir flokkarnir ikki rúma avgerðirnar, sum krevjast víðvíkjandi fremmandum, so í staðin fyri eina virðiliga loysn, gerst samfelagið meira populistiskt høgravent. Ein partur kann tó eisini vera, at flokkurin ikki er ES vinarligur. Valið í Danmark bleiv harafturat stýrt av spunasmiðum og meininga- og spurnarkanningum, og gjørdist á henda hátt keðiligt, ja næstan eitt bakkast fyri fólkaræðið. Einasti møguleikin fyri at føroysku umboðini fáa avgerðandi ávirkan á Fólkatingi tykist at verða um vald umboð í samgonguflokkunum í størri mun skikka sær illa. Í undanfarna valskeiði, blivu trý umboð blivu tveitt ella kroyst úr flokkinum Vinstra, tí tey ikki skikkaðu sær nóg væl. Hin møguleikin er at Dansk Folkeparti elvir til t.d. eina rasistiska gølu, sum ger at tað ikki ber til hjá Vinstra og Konservativu at samstarva við flokkin, men mugu fáa sær meiriluta við at samstarva við Radikalu og norðuratlantisku umboðunum. Hesir møguleikar tykjast tó veruleikafjarir.